


*Nýggi Fiesta er bygdur yvir ein heilt nýggjan plattform, og hevur hann einans Ford merkið til felags við forgangaran*

# Ford Fiesta: Kemur sum heilt nýggjur bilur seinni í ár

**Síðan 1976 eru 10 milliónir Ford Fiesta framleiddir. Núverandi Fiesta hevur 12 ár á bakið og er vorðin ein rættuliga gamal bilur. Seinni í ár kemur ein heilt nýggjur nútímans Fiesta á marknaðin. Bilurin er bygdur í stíl við teir størru Focus og Mondeo**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nýggi Fiesta er bygdur yvir ein heilt nýggjan plattform, og hevur hann einans Ford merkið felags við forgangaran.

Fiesta verður í allar mátar ein størri bilur, bæði longri, breiðari og hægri, eins og aksilfrástøðan eisini er vaksin.

Í fyrstu atløgu kemur einans útgávan við 5 hurðum á marknaðin, men væntandi kemur hann eisini við trimum hurðum í 2003.

Framyvir verða eisini aðrar útgávur bygdar yvir Fiesta plattformin.

### Hydrauliska servostýring

Fiesta hevur ikki elektriska servostýring, sum teir flestu nýggju bilarnir koma við nú, men vanliga hydrauliska servostýring. Grundgevingin hjá Ford er, at bilførarin hevur betur føling við vegnum við hydrauliskari servostýring.

Koyrieginleikarnir eru sum væntað heilt í topp, og bilurin koyrir sum ein dreymur í svingum.

### Høgt til loftið

Sum tað sæst á myndunum, er bilurin, eins og nógvir aðrir nýggir bilar, bygdur soleiðis, at høgt er til loftið. Hetta er við til at gera bilin rúmligan, og gott pláss er eisini til tey ferðandi, bæði framman og aftan.

Man situr væl í bilinum, ið hevur leðurratt sum standard, og eitt framúr gott gearskifti.

### Eisini diesel

Minsti bensinmotorurin er ein 1.3 litur við 68 hk, síðan er ein 1.4 litur við 80 hk og ein 1.6 litur við 100 hk. Dieselmotorurin er gjørdur í samstarvi við PSA, (Peugeot/Citroën).

Í fyrstu atløgu verður bert ein 1.4 litur Duratorq commonrail dieselmotorur við 68 hk, men seinni verða størri motorar á skránni.

### Trygdin

Trygdini í bilinum er einki at ivast í. Við tað at Ford eigur Volvo persónbiladeildina, hava teir leitað sær serkøna hjálp higani.

Hetta sæst aftur í uppbyggingini av karossarínum, við nógvum innbygdum trygdarskipanum.

Tá nýggi Fiesta er komin á marknaðin, eru umsíðir allir teir gomlu Fordarnir skiftir út við nýggjar nútímans bilar.



*Aftan minnir Fiesta ikki sørt um Ford Focus við høgt monteraðum baklyktum*



*Einfalt og snøgt innan, sum í Mondeo. Leðurratt er standard í øllum útgávunum*

## Ford Fiesta 1.6 5/h

Motorurin: 1.6 litur 4 syl. bensin 100 hk

| | |
|---|---|
| 0-100 km/t | 10.8 sek |
| Bensinnýtsla | 15,2 km/l |
| Dekkstødd | 175/65-14 |
| Longd | 392 cm |
| Breidd | 168 cm |
| Hædd | 142 cm |
| Viðførisrúm | 284 litrar |

Søluumboð:
P/F Wenzel
Akranesg. 5
FO-100 Tórshavn
Tel. 313873
www.wenzel.fo



# Ford - rakt plett við nýggja Mondeo

**Nýggi Ford Mondeo bleiv ein succes, frá tí at hann kom á gøtuna av fyrstan tíð. Motorjournalistar hava róst bilinum til skýggja, og sølan hevur verið avbera góð. Bæði í stødd og hvat koyrieginleikunum viðvíkur er hann munandi betri enn forgangarin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Ford roknaðu við at koma beinleiðis í finaluna í kappingini um kundarnar, tá teir komu á marknaðin við nýggja Mondeo, og soleiðis varð. Bilurin var bæði longri og breiðari enn forgangarin, koyrieginleikarnir vóru betri, meira trygdarútgerð og heilt nýggj motroskrá.

### Stórur innan

Umframt at bilurin kann latast eftir ynski, fæst hann í trimum útgávum, hvat útgerð viðvíkur: Ambiente, Trend og Ghia. Mondeo verður gjørdur sum sedan við 4 hurðum, við 5 hurðum og stórari baklúku og sum stationvognur. Innan er Mondeo næstan líka rúmligur sum tann størri Ford Scorpio.

### Reinir dieselmotorar

Mondeo fæst við 4 ymiskum 4 syl. Duratec-HE bensinmotorum frá 110 til 145 hk, einum V6 24V við 170 hk og ST220 við 220 hk. Tríggir deselmotorar frá 90 til 130 hk eru eisini á skránni Nýggju TDCi commonrail dieselmotorarnir hava eina tøkni, sum ger at teir larma minni enn vanligt, og eru millum teir minst dálkandi dieselmotorar í sínum klassa.

### Góðar koyrieginleikar

Teir sum hava konstruerað bilin hava rakt plett hvat viðvíkur koyrieginleikunum, ið eru á sera høgum støði. Stoytdoyvarar, fjaðraskipanin og róðurgreiðir eru so væl sett saman, at tað kann ikki gerast stórt betur. Dekkini, sum eru í støddini 205/55-16, gera eisini sítt til at bilurin er so stúttur at koyra.




*Nýggi Ford Mondeo bleiv ein succes, frá tí at hann kom á marknaðin av fyrstan tíð. Her er Leif Hougaard sølumaður hjá P/F Wenzel, við einum Mondeo í nýggjast útgávuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Innan er Mondeo týðuliga merktur av, at designarin hevur ein fortíð sum designari hjá Audi*




*Mondeo stationcar, ið er ein tann rúmligasti í sínum klassa, er eisini ein rættuliga stórur bilur*

## Ford Mondeo 2.0i Trend 5/h

Motorurin: 2.0 litur 4 syl.16V Duratec-HE 145 hk

| | |
|---|---|
| 0-100 km/t | 9,8 sek |
| Bensinnýtsla | 12,6 km/l |
| Dekkstødd | 205/55-16 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 473,1 cm |
| Breidd | 181,2 cm |
| Hædd | 142,9 cm |
| Eginvekt | 1275 kg |
| Viðførisrúm | 500 litrar |
| Prísur | frá kr. 216.800 |

Søluumboð:
P/F Wenzel
Akranesg. 5
FO-100 Tórshavn
Tel. 313873
www.wenzel.fo